# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Føroyski íslendingurin

**Í august í fjør fekk Finnur Hansson føroyska passið, hann hevði bíðað eftir í fimm ár, og í kvøld spælir hann sín sætta hondbóltslandsdyst fyri Føroyar. – Tað er náttúrligt fyri meg at spæla fyri Føroyar, sigur føroyski íslendingurin á landsliðnum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*




*– Skal eg geva nakað aftur sum landsliðsspælari nakrastaðni, so má tað vera fyri Føroyar, sigur Finnur Hansson*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

At hondbólturin hevur og hevur havt ein stóran leiklut í lívinum hjá 29 ára gamla Finni Hanssoni, er ikki so løgið. Hópatals landsliðsspælarar eru í bæði faðir- og móðurætt, og tað var eisini hondbólturin, sum í 1998 fekk Finn at koma til Føroya úr Íslandi, haðani hann er ættaður.

Pápi hansara, Hans Guðmundsson, var um hetta mundið spælandi venjari hjá H71, og hann fekk sonin at koma hendavegin. Restin er søga, tí hóast Hans fór heimaftur, varð Finnur verandi í Føroyum. Hann hevur spælt við bæði H71, Neistanum, Kyndli og StÍF, og nú spælir hann enntá eisini við føroyska landsliðnum.

– Veruleikin er tann, at kom eg ikki til Føroya tá, hevði eg nokk ikki spælt hondbólt í dag. Í veruleikanum havi eg tað soleiðis, at skal eg geva nakað aftur sum landsliðsspælari nakrastaðni, so má tað vera fyri Føroyar, sigur Finnur, sum síðstu dagarnar hevur drivið á undir venjingunum undan dystinum ímóti Sveis í kvøld og leygardagin.

– Nú havi eg verið so leingi í Føroyum, at tað er náttúrligt fyri meg at spæla á føroyska landsliðnum. Heiðurin at sleppa at spæla fyri landsliðið, er fyri meg ein stórur heiður, og eg føli meg jú nokk so føroyskan eftirhondini.

### Bíðaði fimm ár

Dysturin í kvøld er tann sætti hjá Finni Hanssyni á føroyska hondbóltslandsliðnum, og teir undanfarnu hava verið teir fýra í EM-undankappingini og venjingardysturin ímóti Grønlandi í januar mánaði. Har hevur hann ikki staðið aftan fyri nakran, og higartil eru 19 mál komin á kontuna eisini.

Tað hevði leingi verið ætlan hansara at fáa føroyskt pass, tá hann eftir eina venjingarlegu í Íslandi við Neistanum í august mánaði í fjør kom heimaftur og langt um leingi hevði fingið nýggja passið, sum gjørdi hann til føroyskan íslending. Tá vóru fimm ár liðin, síðani hann søkti um at fáa tað av fyrstan tíð.

Finnur hevur heldur ongantíð dult fyri, at ætlanin við hesum var at fáa ein møguleika at koma á føroyska hondbóltslandsliðið, og tá hann var við landsliðnum á einari venjingarlegu í Norra, bara styrkist hetta ynski hansara. Ein síðuvinningur er tað so eisini, at hann í føroysku kappingini ikki longur verður roknaður sum útlendingur, men sum føroyingur.

Og hóast fleiri í familjuni heima í Íslandi hava verið landsliðsspælarar fyri Ísland, hevur hann ikki hoyrt eitt øvugt orð haðani um tað, men hevur tvørturímóti fingið at vitað frá teimum, at tey skilja avgerð hansara og eisini halda hana vera rætta.

**Lesið meira um Føroyar-Sveis á síðu 22 & 23**

# Ungu meistaraheitini í flogbólti upp á spæl

**Nógv verður gjørt burturúr, nú avgerandi FM-finalurnar í flogbólti hjá unglingunum og teimum 14 ára gomlu verða spældar í Trongisvági leygardagin. Tiltakið stendur lítið aftan fyri steypafinalurnar hjá teimum vaksnu**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Allan leygardagin verður ítróttarhøllin í Trongisvági karmur um tað stóra finalutiltakið, sum Flogbóltssambandið og TB skipa fyri, nú finalurnar hjá gentum 14, dreingjum 14, kvinnu- og mansunglingum eru á skránni. Liðini, sum spæla finalurnar, eru tey, sum gjørdust nummar eitt og tvey í kappingini, sum var í Havn leygardagin 28. februar.

– Hóskvøldið fáa vit Taraflex-gólvið hjá Flogbóltssambandinum suður, og so verður tað beinanvegin lagt á. Gólvið sleppur so at liggja í friði og náðum á allan fríggjadagin, so tað er púra klárt, tá fyrstu dystirnir eru leygarmorgunin, sigur Otto Gram, sum vegna TB samskipar tiltakið.

– Og eg má siga, at tað er ótrúliga stuttligt, at fólk ganga so høgt uppí, at hetta alt skal eydnast væl. Eg kann nevna, at tað bara tók mær hálvan tíma at fáa fatur í 12 monnum, sum allir játtaðu at koma at leggja gólvið á.

### Kjósa bestu spælarar

Fyrsta finalan er tann millum kvinnuunglingarnar hjá Mjølnir og Fleyr, sum byrjar klokkan 10. Síðani er finalan millum KÍF og TB hjá gentum 14 á skránni klokkan 12, og tveir tímar seinni spæla Mjølnir og TB finaluna hjá dreingjum 14. Tann seinasta finalan, sum er millum mansunglingarnar hjá SÍ og Fleyr, byrjar klokkan 14.45.

– Sum nakað nýtt, so verða allir spælararnir presenteraðir, tá teir ein og ein renna inn á vøllin til hvønn dyst. Og eisini verður besti spælari í hvørjari finalu kosin eftir hvønn dystin. Høvuðsdómarin, annardómarin og dómaraborðið gera av, hvør fær tann heiðurin, sigur Otto Gram, sum eisini veit at siga, at besti spælari í hvørjum dysti fær ein vinning frá Flogbóltssambandinum.

– Vit hava eisini fingið lokalar politikarar og stuðlar at handa steyp og heiðursmerki eftir hvørja finalu, og millum finalurnar hava vit eisini ymiskt til undirhalds, so sum livandi tónleik og dansigentur. Eisini hava vit andlitsmáling og køkutombola, og allan dagin bjóðar matstøðan í høllini kalt borð.



*Eftir hvønn finaludyst í Trongisvági leygardagin verður besti spælari kosin*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/ Einslistir*